## Bárður í Leikalund

**Í oktober mánaða sýnir Bárður Oskarsson fram 7 av sínum málningum í Leikalund í Klaksvík. Bárður hevur millum annað myndprýtt bókina Ein hundur, ein ketta og ein mús, sum nú verður útgivin í Fraklandi**



*Bárður Oskarson hevur vakt stóran áhuga uttanlands við tekningunum í bókini Ein hundur, ein ketta og ein mús, sum nú verður útgivin í Fraklandi*

FRAMSÝNING

Bárður er føddur í 1972, og umframt at vera teknari og málari, er hann eisini rithøvundur. Hann hevur málað síðani 1985, og teknað barnabøkur síðan 1986. Um málningarnar hjá Bárði kann sigast, at teir onkuntíð mynda fólk, onkuntíð kanska og onkuntíð als ikki. Málningarnir eru einfaldar myndir, vektleys rúm og verur av ymsum bregði.

Bárður Oskarsson hevur áður tikið lut á fylgjandi framsýningum:

Ólavsøkuframsýningin, 1992, 1995 og 1998-2004

Várframsýningin 2003, 2004 og 2005

Bryggen 2004

Føroyingahúsið í Keypmannahavn 1994, 1995 og 2002

Smiðjan í lítluvík 2002 og 2003

Cafe Jonas í Keypmannahavn 2004

Christiania í Keypmannahavn 2005

Baarse Bibliotek í 1994.

Framsýningin verður at síggja allan oktober mánaða. Opið er:
Mánadag til fríggjadag: 10.00-23.00
Leygardag: 10.00-13.00 og 19.00-23.00
Sunnudag: 19.00-23.00

## Gásafyrilestrar á Sunda Bókasavni

FYRILESTUR
*tíðindaskriv*

Bókasavni hevur í nøkur ár skipað fyri ymsum fyrilestrum í vetrarhálvuni. Mikukvøldið 19. oktober klokkan 20 skipar Sunda Bókasavn fyri fyrilestrum um gásahald og tilgerð av gás.

Andreas Reinert fer at halda fyrilestur um gásasløg og gásahald í Føroyum, meðan Kristianna Rein fer at greiða frá um tilgerð av gás og onkrum serstøkum gásarættum.

Eftir fyrilestrarnar verður eisini høvið at smakka breyðbitar við turkaðari gás sum viðskera og at fáa ein drekkamunn við køku.

Tiltakið verður í høllini í Norðskála-Oyrar skúla.

## Páll Finnur Páll á Hálsi

Seinastu vikuskiftini hava Páll Finnur Páll spælt fyri nógvum fólki í Suðuroynni og í Kambsdali, næsta vikuskiftið vitjar væl dámdi bólkurin í Havn. Í ítróttarhøllini á Hálsi, verður høvið at hoyra um partering av grannum, mannaát og kynsligt misbrúk og um at sova hjá Kaj.

Men eisini tey fittaru løgini verða ivaleyst á skránni, og havnarfólk fáa høvið at syngja við til størsta hittið í nýggjari tíð »Forelskaður Sjónleikari«, og spurningurin er um takið lyftir seg, tá ein full ítróttarhøll brølar við »Hey, hey, gev mær ost uppá breyð…«

Konsertin í Havn verður síðsta konsertin á hesum sinni. Eisini verður diskotek við tí allar nýggjasta. Tað er DJ-Markyman sum fer at rokka húsið, sum fyriskiparin tekur til í tíðindaskrivið. Tiltakið byrjar kl. 23:30 og endar kl. 03:30.

Bussamband verður úr Eysturoynni, Vágunum og Vestmanna.Tað ber til at bíleggja pláss á telefon (Vága og Vestmannaleiðin) 21 77 53 (Eysturoyaleiðin) 505220.

**nud**

Verfall:

# Landssjúkrahúsið í undantaksstøðu

**Nú starvsmannafelagið er í verkfall, fær Landssjúkrahúsið bert tikið sær av bráfeingis tilburðum. – Tað er bert ein spurningur um tíð, hvussu leingi vit kunnu halda tí bráneyðuga arbeiðinum koyrandi við verandi undantøkum, sigur Poul Geert Hansen, stjóri á Landssjúkrahúsinum**

VERKFALL
*Anna V. Ellingsgard*
*anna@sosialurin.fo*



*Verkfallið hevur við sær, at bíðilistarnir verða støðugt longri, og harvið økist eisini vandin fyri, at fleiri tilburðir gerast bráfeingis, sigur Poul Geert Hansen, stjóri á Landssjúkrahúsinum*

Ein stórur partur av starvsfólkunum á Landssjúkrahúsinum eru limir í Starvsmannafelagnum, og eru flestu deildir tí raktar, nú verfall er. Allar vanligar innleggingar, kanningar og viðgerðir eru útsettar, og í móttøkuni verða bert bráneyðugar uppringingar umstillaðar.

### Enn fleiri undantaksloyvi

Poul Gert Hansen, sjúkrahússtjóri sigur, at umvegis Fíggjarmálaráðið hava tey fingið undantaksloyvi, so at eitt nú maskinverk-staðurin og KT deildin, sum røkja tey ymsu teknisku tólini, framvegis virka. Móttøkan virkar í ávísan mun við tað at fólk, sum ikki hava bráneyðug ørindi, fáa vegleiðing í, hvussu tey sjálvi kunnu ringja beinleiðis til deildirnar.

Í veruleikanum er Landssjúkrahúsið í ein undantaksstøðu, har tað bert er ein spurningur um tíð, hvussu leingi støðan kann halda áfram. Tí verður nú søkt um fleiri undantaksloyvi, í fyrstu atløgu fyri at halda tí mest bráneyðuga arbeiðinum koyrandi. Innan leingi verður neyðugt at fáa undantaksloyvi til goymsluna, sum útflýggjar útgerð av ymsum slagi til deildirnar, og leiðslan hevur longu søkt um undantaksloyvi til arbeiðsøkið hjá læknaskrivaranum.

– Tað má avgjørt metast at vera bráneyðugt, eisini fyri eftirfylgjandi viðgerðir at allar sjúkrajournalir verða førdar, sum tær skulu. Í løtuni verða upplýsingar bert noteraðir, og støðan er ikki haldbar í longdini, sigur Poul Geert Hansen.

Hann leggur afturat, at enn er ringt at meta um, hvørjar avleiðingar støðan hevur fyri sjúklingar. Men bíðilistarnir gerast í øllum førum longri, og harvið økist eisini vandin fyri at fleiri av viðgerðunum gerast bráfeingis.

Settlers:

# Føroyingarnir steðgaðir í hálvfinaluni

**Tað gekk ikki heilt eftir vild hjá føroysku umboðunum í Heimsmeistarakappingini í brettspælinum Settlers, sum um vikuskiftið hevur verið í Týskalandi**

SETTLERS
*Snorri Brend*



*Settlers er spennandi brettspæl, har tað nú eisini verður kappast um heimsmeistaraheiti*

Mong hava helst fylgt við spenningi eftir úrslitinum hjá teimum báðum føroyingunum – Reimundi Langgård og Súsonnu Joensen.

Um vikuskifti luttóku tey saman við 50 øðrum í hesi heimsmeistarakappingini, og vóru í gjár komin víðari til hálvfinaluna, sum var í dag. Íalt vóru 16 fólk við í hálvfinaluni.

Tíverri, so var eydnan ikki heilt við teimum báðum, Reimundi og Súsonnu. Tey vórðu í dag útsligin í hálvfinaluni, og fingu so ikki nakað heiðursmerki á hesum sinni.

Hinvegin so eru tey í øllum førum vorðin eitt stórt upplivilsi ríkari.

Tað er sjálvandi ikki heilt kostnaðarleyst at fara eina slíka ferð, men Reimund og Súsanna fingu góðan stuðul frá Atlantsflogi, Kall og Thomas Dam á Hálsi, soleiðis at hetta kundi gerast veruleiki.